# Teitur



**Teitur spældi mikukvøldið í Norðurlandahúsinum fyri eini fullsettari høll av áhoyrarum. Hetta gjørdist eitt satt gott upplivilsi av eini konsert, har Teitur spældi nýtt sum gamalt og fitt sum provokerandi**

KONSERUMMÆLI
*Líggjas Olsen*
*liggjas@gmail.com*
*myndir: mureldur*

»I always had the voice and now I am a singer«

Soleiðis legði Teitur út mikukvøldið við lagnum av nýggju fløgu sínari The Singer. Væl varð sungið, og eitt tað fyrsta, eg hugsaði, var, at røddin hjá honum er altso vorðin betri enn nakrantíð. Teitur er júst afturkomin av konsertferð í USA og er tískil í góðari venjing, og hetta hoyrdist beinanvegin í røddini hjá honum, sum veruliga er blivin ein ordilig sangrødd. Ikki tí, røddin hevur altíð verið serstøk og góð, men ongantíð hevur hann sungið so ómakaleyst og gott, sum júst nú. Eg vildi næstan sagt betri enn á fløguni, men tað kann kanska diskuterast.

Einsamallur legði Teitur út við hesum lagnum, fyri síðani at bjóða bólkinum innar á pallin og halda áfram við nøkrum løgum av seinastu fløgu teirra. Ongar strúkarar ella violinir ella kórrøddir hevði Teitur við sær mikukvøldið. Bert bass, trummur og tangentar, og hetta hevði sjálvsagt við sær, at útsetingarnar vóru nakað einfaldari í mun til tær á fløgunum. Hesum slapp bólkurin væl frá. Mikael Blak á bass var sum ikki einaferð sera góður og tryggur og virkaði sum eitt superlím fyri hinar í bólkinum, meðan trummurnar ikki gjørdu meira enn júst neyðugt. »Catherine the Waitress« manglaði kanska sum heild eitt sindur av pompøsiteti, men annars riggaðu løgini av The Singer heilt væl, undirspæld sum tey nú vóru. Eitt lag, sum riggaði serstakliga væl av nýggju fløguni var friðarligi kærleikssangurin »Don't Let Me Fall In Love With You«. Eitt deiligt lag, har tú veruliga kendi, at viðkomandi fellur í forelskilsi, um man so má siga.



*Hóast nakrar feilir og onkrar eitt sindur falskar strúkarar, var bólkurin ógvuliga væl samanspældur og konsertin góð*

## Josephine og falskir strúkarar

Síðani førkaði Teitur seg frá The Singer og fór at tríva í løg av Stay Under The Stars, men áðrenn sluppu vit líka at hoyra vælumtókta lagið »Josephine« av fyrstu fløguni Poetry and Airplanes. Eitt ótrúliga vakurt og væleydnað lag, sum Teitur eisini sang til UG. Havi tó hug at viðmerkja, at eg helt ikki syntetiski strúkararnar rigga so væl her. Lagið hevði hug at detta niður ístaðinfyri at fara á flog, og tað var eitt sindur ergiligt. Tangentleikarin hevði annars nakrar vælljóðandi strúkarar í sínum keyboardi, ið hann dugdi væl at brúka í settinum. Men júst í hesum lagnum komu teir ikki til sín rætt. Tíverri, tí hatta lagið kann veruliga flyta teg heilt til himmals, um tað verður framført rætt. Burtursæð frá í støðum eitt sindur miseydnaðu synth-strúkarunum, so sat tað heilt væl, og fólk vóru glað fyri, at Teitur hevði valt hetta lagið uppí skránna.

## Kom aftur, Louis!

Kanska best kenda lagið hjá Teitur, »Louis Louis«, slapp eisini upp í part. Teitur greiddi frá, at lagið hevði hann skrivað í Saksun í 2004. Hetta var um tað mundið, tá amerikansku veljararnir vildu tað so, at Bush skuldi innaftur í Hvítu Húsini. Lagið er ein áheitan til Louis Armstrong um at koma aftur til okkum við sínum upplyftandi, glaða tónleiki, í eini heldur myrkari tíð. »Louis, Louis, the world is not